FISKIVINNU- OG SAMFERÐSLUMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

2. mai 2025
Mál: 25/10461

Tygara skriv: 52-098/2024

Svar til skrivligan fyrispurning nr. 52-098/2024 frá Karlot Hergeirsson, løgtingsmanni, settur landsstýrismanninum í fiskivinnu- og samferðslumálum, Jóhan Christiansen, um nýggja túrin til Nólsoyar

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær kunnu nólsoyingar vænta, at nýggi túrurin til Nólsoyar kemur?
2. Er samráðið við nólsoyingar byrjað um, nær á degnum nýggi túrurin skal liggja?

Svar til spurning 1 og 2
Í dag eru 42 dupultir túrar um vikuna í ferðaætlanini fyri sigling til Nólsoyar.

Sum Strandferðslan hevur skilt, er ynski frá nólsoyingum serliga at fáa ein túr afturat gerandiskvøld kl. 20:00 av Havnini. Strandferðslan hevur gjørt greiningar av siglingini í mun til verandi ferðaætlan og í mun til eina møguliga broytta ferðaætlan. Greiningarnar hava samanumtikið snúð seg um ásetingarnar, sum øll sigling hjá ferðafólkaskipunum hjá Strandferðsluni skulu lúka; tað vil siga ásetingar um hvílitíð, arbeiðstíð og trygd.

Niðurstøðan av hesum greiningunum er, at tað tíverri ikki ber til við verandi ferðaætlan at leggja ein túr inn kl. 20:00.

Ein leistur kundi tó møguliga verið, at onkrir túrar í verandi ferðaætlan verða fluttir, so arbeiðsætlan og hvílitíð lúka galdandi ásetingar. Hetta krevur tó eitt neyvt samskifti við nólsoyingar, so broytingarnar ikki elva til aðrar avbjóðingar fyri tey, sum ferðast á leiðini.

Strandferðslan fer í næstum at biðja um fund við staðbundnu nevndina í Nólsoy fyri at umrøða hesi viðurskifti nærri.

Jóhan Christiansen
Landsstýrismaður